# Fyrstu føroyameistararnir í hondbólti funnir



*Ovast frá vinstru: Høgni Klein Olsen, Sverri Mortensen, Frank Askildsen. Húkandi frá vinstru: Zakaris Unason, Rene Joensen, Thomas Knudsen, Ivan Hofgaard og Tróndur Jensen*

Dreingir 10 ár hjá Kyndli gjørdust fyrstu føroyameistararnir í hondbólti í ár. Ungu garparnir hava gjørt bart í kappingini, tí teir hava vunnið allar sínar dystir. Harafturat er málúrtøkan framúr, tí liðið hevur skorað ikki færri enn 176 mál í teimum 15 dystunum, meðan einans 36 mál eru farin inn í hinum endanum, so ikki kann sigast annað, enn at framtíðin hjá havnarfelagnum sær lovandi út. Sosialurin ynskir ungu Kyndlgarpunum hjartaliga tillukku við føroyameistaraheitinum.

**tn**

# HB og KR hittast í Havn 24 apríl

**Aftur í ár hittast føroysku og íslendsku fótbóltsmeistararnir í dystinum um sonevnda Atlantssteypið. Dysturin verður í Havn tann 24 apríl**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur tað verið fastur táttur, at føroysku og íslendsku meistararnir hittast í dysti um sonevnda Atlantssteypið. Í ár verður dysturin í Føroyum, og hann verður ein endurtøka av dystinum síðsta ár. Tað eydnaðist bæði føroysku meistarunum úr HB, og islendsku meistarunum úr KR, at endurvinna meistaraheitið. Tá ið dystast var um steypið í Reykjavík í fjør, vunnu íslendsku meistararnir dystin 2-0, men í 100-ára føðingardagsári sínum ætlar HB sær at vinna, verður sagt.

KR vil eisini hava venjingardyst móti einum øðrum føroyskum liði

Heimasíðan hjá HB veit at siga, at íslendingar koma manssterkir til dystin. Umfram vanliga leikarahópin og tey fólk, ið eru um hópin, hevur KR ætanir um at bjóða okkurt um 20 viðhaldsfólkum við til Føroya fyri ein sámuligan pening.



*R'uni Nolsøe og HB vóna, at 100-ára haldið kann byrja við sigri á íslendsku meistarunum*

Eftir ætlani verður íslendski hópurin í Føroyum í einar fýra dagar, og tískil kundi KR hugsað sær at fingið í lag ein venjingardyst móti enn einum føroyskum liði. Hetta kann tó gerast ein trupulleiki, verður sagt á www.hb.fo, tí hetta er júst um tað mundi, at føroyska landskappingin byrjar. Av somu orsøku verður arbeitt við at flyta dystin millum HB og Skála í fyrsta umfari av landskappingini, men enn er ongin avgerð tikið hesum viðvíkjandi.

# í Býin

fk Matseðilin

Hósdagin 26.feb :
**Kálvafrikase**

Fríggjadagin 27.feb :
**Kotelettir**

Leygardagin 28.feb :
**Oksasteik**

Mánadagin 1. mars:
**medistarpylsa**

Týsdagin 2.mars:
**Fisk í fat**

Mikudagin 3.mars:
**Hamburgaryggur**

***

**Seinnaparts-TILBOÐ**
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 30,00

Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

*Koyrt verður leygarkvøld:*

Vágaleiðin *(tlf. 217753)*
• Úr Vágunum — *bert eftir avtalu*
• Tórshavn - Vágar — kl. 04.30

Vestmannaleiðin *(tlf. 217752)*
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

AUTO
-Dag & nátt-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
-Alt døgnið-
Nú fáast eisini Talutíðarkort
BENZIN
DIESEL
KIOSK
Føroya Tele Kall
AUTO 311234



P-DAGUR
FRÍGGJADAGIN 27. FEBRUAR
CAFÉ NATÚR
Klokkan 16.00, 17.00 og 18.00
ECLIPSE
Klokkan 24.00
CAFÉ NATÚR
eclipse night club



í Býin í Býin



Hóskvøldið
20.00-20.30 STÓR GLØS KR 10,-
21.00-21.30 STÓR GLØS KR 10,-

Fríggjakvøldið
16.00-18.00 P DAGUR
20.00 KVINNUKVØLD - KARAOKE
MEGA FEMININ BARRTILBOÐ
MÓTASÝNING VIÐ JUNIIK OG SIRI
ATGONGUMERKI KR. 50,- INCL. OKKURT FLÓTANDI

Leygardagin
15.15 FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA
19.30 ITALSKUR FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA
UM KVØLDIÐ SPÆLA DÉJÀ VU

Sunnudagin
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA

YERTSHÚSIÐ
TÍ EINGIN VEIT Á MORGNI AT SIGA, HVAR HANN Á KVØLDI LIGGUR AVDOTTIN

Sosialurin 341800

BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

club KAGGIN
Hóskvøldið spæla
JM band
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Fríggjakvøldið
JM BAND
Leygarkvøldið spæla
JM BAND
www.kaggin.fo

Sosialurin 341800

Vikumenu
Forrættur
Heimagjørd krúnhjortapaté, borðreidd á frisee, við Sauterne gelé, persilluolju og sólturkaðum traneberum.
Høvuðsrættur
Ovnbakað skøta, borðreidd við braseraðum fennikel, appelsinsause og dagsins garniture.
Dessert
Nougatklødd hasselnøtrond við frískari frukt og heimagjørdum vaniljuísi.
RESTAURANT MERLOT
Borðbílegging á tel 31 11 21

Sosialurin 341800

Manhattan PUB & CAFE
Livandi tónleikur
Hóskvøldið, fríggjakvøldið og leygarkvøldið við:
Eyðun & Jónas
Manhattan PUB & CAFE
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96



GUÐRUN SÓLJA JACOBSEN
**Café Natúr**
Hóskvøldið 26. februar
Fríggjakvøldið 27. februar
Leygarkvøldið 28. februar

**Eclipse**
Fríggjakvøldið 27. februar kl. 02.00

**Platform**
Leygarkvøldið 28. februar kl. 02.00
eclipse CAFÉ NATÚR PLATFORM

Klaksvíkar Klubbi Tel 455681



**Fríggjakvøldið**
Kl. 17 Fimmari
**Leygarkvøldið** (opið frá kl. 22)
Kl. 24 **Dansur -** Við Jákup Marnar og Heina
**Sunnudagin**
Kl. 15 Sjavskapping

felagið
Tórshøll
í vikuskiftinum spæla
FLÚRAR
Týskvøldið 2. mars kl. 19.00 - Sjavskapping
Ókeypis atgongd í kjallaranum fríggjakvøld og leygarkvøld